# Dátuverndarkunning

**Soleiðis viðgera vit tínar persónsupplýsingar**

**Mai 2024**

Í Skopunar kommunu viðgera vit persónsupplýsingar, sum eru neyðugar fyri at kunna loysa okkara uppgávur. Tað er okkara ábyrgd at tryggja, at tú trygt kann lata kommununi tínar persónsupplýsingar.

Í hesi dátuverndarkunning kanst tú lesa nærri um hvussu vit viðgera persónsupplýsingar í okkara arbeiði sum kommunalur myndugleiki og um tíni rættindi í hesum sambandi. Hetta er galdandi hvørt tú ert borgari, veitari ella starvsfólk í kommununi.

Í dátuverndarkunningini koma vit nærri inn á:

- Dátuábyrgd og dátuverndarfólk
- Endamálið við okkara viðgerð
- Bólkar av persónsupplýsingum
- Hvaðani upplýsingarnar koma
- Heimildargrundarlagið fyri viðgerðini
- Hvørjum kommunan letur persónsupplýsingar til
- Varðveitslu av persónsupplýsingum
- Tíni rættindi

**Inngangur**
Skopunar kommuna hevur sum kommunalur myndugleiki eina røð av uppgávum. Kommunan hevur fyri neyðini at viðgera persónsupplýsingar í sambandi við sítt virksemi.

Hendan dátuverndarkunning hevur til endamáls at kunna teg um hvussu kommunan viðgerð tínar persónsupplýsingar.

**Dátuábyrgdari**
Skopunar kommuna er dátuábyrgdari. Allir spurningar og viðurskifti viðvíkjandi persónsupplýsingum og dátutrygd ella møguligum trygdarbrotum skulu stílast til kommununa.

**Skopunar kommuna**
Tormansvegur 12
240 Skopun
Tlf. +298 36 13 49
Teldupostur: skopun@skopun.fo
Avgreiðslutíðin er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-13.

**Samband við okkara dátuverndarfólk (DPO)**
Skopunar kommuna hevur valt at seta eitt uttanhýsis dátuverndarfólk, og viðkomandi hevur ikki postadressu í kommununi.

Dátuverndarfólkið veitir okkum hjálp við at tryggja dátuverndina í kommununi. Um tú hevur spurningar um okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum, kanst tú eisini seta teg í samband við dátuverndarfólkið á:

**Dátuverndarfólk Jónas Tór Næs, advokatur**
Faroe Law
Magnus Heinasonar gøta 10
100 Tórshavn
Tlf. +298 22 28 38.
Teldupost: jtn@faroelaw.fo

## Endamálið við viðgerð av persónsupplýsingum
Sum kommunalur myndugleiki hevur kommunan eina røð av uppgávum. Eitt nú veitir kommunan tænastur og veitingar til borgarar og fólk annars. Talan kann antin vera um virksemi, sum kommunan hevur skyldu til at loysa ella tænastur, sum kommunan hevur skyldu til ella hevur avgjørt at veita tær.

Dømi uppá nær tað er neyðugt hjá kommununi at viðgera persónsupplýsingar um teg:
- Tá ið tú sendir kommununi umsókn, fyrispurning, klagu o.a.
- Tá ið avtala verður gjørd millum teg og kommununa
- Tá ið ikki hevur vent tær til kommununa, men tú ert partur av einum máli í kommununi, t.d. um kært verður um eitt mál, sum tú hevur verið partur av.

Fyri at kunna loysa hesar uppgávur og veita tær tænastur, sum kommunan bjóðar, er neyðugt hjá kommununi at viðgera persónsupplýsingar um teg.

*Hvørjum persónsupplýsingum hava vit tørv á?*
Júst hvørjar upplýsingar vit viðgera, valdast endamálið við viðgerðini. Vit savna einans upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vit fáa viðgjørt títt mál. Hetta kunnu vera *vanligar persónsupplýsingar* og *viðkvæmar persónsupplýsingar*, alt eftir endamálinum við viðgerðini.

Í flestu førum hava vit eisini tørv á tínum p-tali til eintýðuga eyðmerking.

Tú hevur altíð rætt til at fáa at vita, hvørjar upplýsingar vit viðgera um teg.

*Hvar koma upplýsingarnar frá?*
Tað er ymiskt, hvussu vit fáa upplýsingar um teg.

Oftast fáa vit upplýsingarnar beinleiðis frá tær.

Vit kunnu tó eisini fáa upplýsingar eitt nú frá

- øðrum myndugleikum, stovnum og fyritøkum,
- skráum, eitt nú hjá TAKS ella Fólkayvirlitinum ella
- frá øðrum borgarum, ið leggja eitthvørt mál fyri kommununa, har tú ert ein partur.

Tú hevur altíð rætt til at fáa upplýst hvørjar upplýsingar vit skráseta um teg.

## Heimild

Hvør okkara heimild at viðgera persónsupplýsingar um teg er, er ymiskt alt eftir hvørjar upplýsingar vit viðgera og hvat endamálið við viðgerðini er. Vit kunnu einans viðgera upplýsingar, sum eru neyðugar til endamálið við viðgerðini.

Okkara viðgerðarheimild eftir dátuverndarlógini (“DVL”) er í høvuðsheitum:

- DVL § 8, stk. 1, nr. 1 til 5 (vanligar persónsupplýsingar)
- DVL § 12, stk. 1, nr. 1, 2, 3, 6 ella 7 (viðkvæmar persónsupplýsingar)
- DVL § 16 (p-talið)

Umframt ásetingunum í DVL eru serligar reglur galdandi fyri viðgerð av persónsupplýsingum á einstøkum lógarøkjum. Tá ið slíkar serreglur eru galdandi, fylgja vit sjálvsagt eisini hesum reglum.

Í einstøkum førum hava vit tørv á samtykki frá tær fyri at viðgera persónsupplýsingar um teg. Slíkt samtykki verður fingið til vega sambært ásetingunum í DVL § 9.

## Hvørjum letur Skopunar kommuna persónsupplýsingar?

Í ávísum førum letur Skopunar kommuna persónsupplýsingar víðari, men sjálvandi einans tá ið heimild er fyri tí.

Vit kunnu eitt nú lata persónsupplýsingar víðari til okkara dátuviðgerar (uttanhýsis veitarar). Uttanhýsis dátuviðgerar viðgera dátur okkara vegna eftir nærri ásettum avtalum. Hesar avtalur innihalda skjalfest boð um, hvussu persónsupplýsingar skulu viðgerast, og at persónsupplýsingar bert kunnu viðgerast sambært hesum boðum.

Í útgangsstøðinum verða persónsupplýsingar ikki fluttar til lond uttan fyri ES/EBS. Um upplýsingar verða fluttar til lond uttan fyri ES/EBS, tryggja vit okkum, at verndarstøðið er nøktandi ella at fullgóð trygd er fyri, at rættindi og virkin rættarstig eru tøk fyri skrásetta.

Vit kunnu lata persónsupplýsingar víðari til myndugleikar, fyritøkur, ráðgevar og aðrar persónar, sum vit skulu samskifta við í sambandi við málsviðgerð. Í ávísum førum lata vit persónsupplýsingar víðari um teg sbrt. løgtingslóg um alment innlit ella eftir fyrisitingarlógini.

*Varðveitsla og striking*

Skopunar kommuna hevur skyldu til at varðveita upplýsingar í málum, fyri at skjalfesta málsviðgerðina. Hetta er krav sambært fyrisitingarlóggávu, skjalasavnslóggávu o.a. Sum almennur myndugleiki skjalførir kommunan post, sum kemur inn og fer út. Í hesum sambandi fylgir kommunan leiðreglum fyri, hvussu leingi upplýsingar skulu goymast.

Mál hjá kommununi verða flutt á goymslu til Tjóðskjalasavnið sambært løgtingslóg um skjalasøvn. Tá ið upplýsingarnar eru goymdar á Tjóðskjalasavninum ella vrakaðar, hevur kommunan ikki longur atgongd til upplýsingarnar.

Á summum økjum kann styttri ella longri strikingarfreist vera ásett í lóg.

Starvsumsóknir verða burturbeindar 6 mánaðir eftir, at kommunan tók avgerð í málinum.

## Skopunar kommuna á sosialum miðlum

Skopunar kommuna er á Facebook, sum er ein partur av Meta platforminum. Facebook hevur sín egna privatlívspolitikk. Vit mæla til, at tú lesur privatlívspolitikkin hjá Facebook, áðrenn tú brúkar síðuna hjá Skopunar kommunu á facebook.

Skopunar kommuna skal gera vart við, at tá ið tú brúkar síðuna hjá kommununi á Facebook, savnar Facebook inn upplýsingar um teg við at brúka farspor. Tað hevur við sær, at vit kunnu fáa hagtøl yvir vitjandi á síðuni, og Facebook brúkar hesar upplýsingar til at tillaga tín vanga og fyri at vita, hvørjar lýsingar tú skalt síggja.

Tú kanst lesa dátuverndarkunningina hjá META her og politikkin hjá META um brúk av farsporum her.

## Tíni rættindi

Tú hevur sambært DVL eina røð av rættindum í mun til okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum. Um tú ynskir at útinna hesi rættindi, skalt tú seta teg í samband við kommununa.

*Rætturin til innlit*

Tú hevur rætt til at fáa at vita, hvørjar persónsupplýsingar kommunan hevur um teg.

Fyri at kunna viðgera tína umbøn um innlit, heita vit á teg um at greiða okkum nærri frá á hvørjum øki, tú hevur havt samband við kommununa, t.d. vegna heimahjálp, skúla o.a. Hetta ger tað lættari hjá okkum at finna upplýsingarnar fram um teg.

*Rætturin til at taka samtykki aftur*

Um okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum er grundað á samtykki frá tær, hevur tú altíð rætt til at taka samtykkið aftur. Tá ið tú tekur samtykkið aftur, steðga vit viðgerðini av teimum persónsupplýsingum, sum var grundað á samtykkið.

Gev gætur, at um tú tekur aftur eitt samtykki, eru vit møguliga ikki før fyri at veita tær eina ávísa tænastu.

*Rætturin til rætting*
Tú hevur rætt til at biðja um at fáa rættað persónsupplýsingar, sum eru rangar ella villleiðandi, soleiðis at vit ikki viðgera upplýsingar um teg, sum eru skeivar ella ófullfíggjaðar.

*Rætturin til striking*
Í serligum føri hevur tú rætt til at biðja um at fáa strikað persónsupplýsingar, sum vit hava um teg. Rætturin er ikki treytaleysur, tá ávísir upplýsingar ikki mugu strikast grundað á aðra lóggávu, ella um avtala og ávíst endamál gevur kommununi rætt til at varðveita og viðgera persónsupplýsingarnar.

*Rætturin til mótmæli*
Tú kanst átala, at persónsupplýsingar um teg verða viðgjørdar. Um átalan má metast heimilað, skulu persónsupplýsingarnar um teg ikki viðgerast. Tó kunnu upplýsingarnar møguliga framvegis nýtast til at viðgera onnur lóglig endamál.

*Rætturin til viðgerðaravmarking*
Í serligum føri hevur tú rætt til at biðja um at fáa viðgerðina av tínum persónsupplýsingum avmarkaða. Um treytirnar til viðgerðaravmarking eru loknar kunnu vit einans viðgera tínar persónsupplýsingar í serligum førum.

*Rætturin til at klaga*
Tú hevur altíð møguleika at klaga til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgd/-ur við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum.

Tú finnur kontaktupplýsingarnar hjá Dátueftirlitinum á www.dat.fo.